
Føroysk sending í kvøld kl. 19.55

Skemtarin Herman Jacobsen



Sum »terradropar« í tí nógva útlendska tilfarinum, ið vit noyðast at berjast við eitt sindur enn, kemur ein sending íkvøld, sum Jógvan Asbjørn hevur lagt til rættis. Tað er prát og tónleikasending við Herman Jacobsen, vísusangara. Sendingin er gjørd í samband við at Herman Jacobsen og tónleikabólkur í dag gevur út eitt band, við vísum og sangi. Størsti parturin av bandinum er Evert Taube vísur, sum Herman sjálvur hevur umsett.

Í sendingini sigur hann í práti við J.A.S., at hann hevur fingið inspiratión til umsetingarnar í ferðum í Suðurameriika í 1981 og á rækjuveiðu við Svalbard í 1982. Umframt Evert Taube vísur er ein vísa, sum Oskar Hermansson hevur gjørt, sum eitur »Omma mín«. Eisini »Til Havnar vit fara« hevur fingið innivist.

Ein serliga samansettur tónleikabólkur við bestu tónleikarum okkara hevur fylgispælið. Tað eru: Heðin Thomsen, Kollbein Simonsen, Niels Olsen, Brandur Øssursson, Finnbogi Johannesen, Hans Christian Clementsen, Thomas Michael Smith og Poul E. Poulsen og Guðmundur Steinsson.

Tað er Milson Zachariassen, sum hevur staðið fyri innspælingini.



Í kvøld kl. 21,20:

Di, dómari og kinesisku klosturmorðini

Hetta er krimifilmur, sum hópin av spenningi.

Filmurin er gjørdur eftir krimiskaldsøguni hjá Robert van Fulik.

Di, dómari, sum í veruleikanum er uppdagari, kemur eina nátt til eitt kleystur við trimum konum sínum og tænastufólkum. Illveður er, og hann biður um at fáa innivist á kleystrinum, sum fyri størsta partin er uppalingarheim fyri gentur, sum hava rik foreldur.

Fleiri kvinnur eru deyðar í kleystrinum av ókendum orsøkum, og tá Di, dómari, er vitni til eitt morð afturat, ger hann av at finna tann seka. Tó snýnast øll at hava knívar í ermunum og eiturevni í drykkjubikørunum.

Hendingin fer fram í ár átta!

Íkvøld kl. 22,55:

Heimsins vánaligastu vertar

Mel Smith og Griff Rhys Jones eru tveir skemtarar, sum vit áður hava sæð í sendingini »Tað er ikki TV-avisin«.

Hesaferð framføra teir smáleikir, sum eru ógvuliga enskir í skemtingarhátti.

Í sendingini eru teir tveir skemtarar, sum royna at gera gjøldur burturúr eini amerikanskari showsending. Skemtararnir finna nýggjar leiðir at ganga, m.a. koma teir við nýggjari sending, sum er tíðindi fyri eldri fólk. Hvussu tað myndar seg, sæst í seinnu sending í kvøld.

sjónvarp

Týsdagin 24. juli

19,30 **Radisurnar**
19,55 **Vísur og prát**
20,55 **Oili Mäki**
21,20 **Di dómari og kinesisku kleysturmorðni** — am. filmur
22,55 **Heimsins vánaligastu vertir**
23,25 **Liðugt**

Íkvøld kl. 20,55:

Oili Mäki, vevkona

Hetta er norðvisionsending um finsku tekstil-listkvinnuna og proffesson Oili Mäki. Hon hevur m. a. gjørt nógvar lutir til kirkjur í Finnlandi, eitt nú altardúkar, veggjateppi, messuhagil o. a., sum eru ógvuliga væl umtókt listaverk.

Í sendingini sigur hon frá átrúna sínum, sum hevur havt týdning í listaarbeiði hennara. Hon sæst arbeiða við vevinum og eisini verða bíbilsku og meira abstraktu verk hennara víst í sendingini



Fyri børn í kvøld kl. 19,30:

Lívið er eitt sirkus

Í sendingini í kvøld, sum kallast «Lívið er eitt sirkus, Sørin Bruun», kemur ein sirkusbólkur á vitjan í býnum, har Radisurnar og Nuser búgva.

Nuser, hundurin hjá Sørin Bruun, fær hug á einum hundi, sum eitur Fifi.

Tá radisurnar koma til framførsluna í sirkus, gerast tey bilsin, tá Nuser framførir saman við hinum sirkusfólkunum. Øll stuttleika sær tó óført um Nuser, uttan Sørin Bruun, sum heldur, at hundur hansara heldur átti at verið heima og ansa húsi teirra.

Tað hevur Nuser ikki stundir til. Hann er bitin av sirkuslívinum, til hann verður fyri eini mannminkandi hending....

